


Der neue Golf

Bilasølan við Øssur Johannesen, Vegurin langi, 315354




# Limafundur um viðgerðarmøguleikar

LIMAFUNDUR
*tíðindaskriv*

Giktafelag Føroya skipar fyri limafundi mikukvøldið 12.nov kl 19.30 í MBF húsinum á Ìslandsvegi 10c í Tórshavn.

Evnið á limafundinum verður viðgerð og viðgerðarmøguleikar fyri giktsjúk fólk í Føroyum.

Giktafelag Føroya ynskir við hesum limafundinum at kunna limirnar um tað arbeiði sum felagið hevur gjørt í hesum sambandi, t.v.s at vit hava lagt okkara støðu fyri Landsstýrismannin í heilsumálum, og at vit ynskja at hoyra frá limum felagsin um teirra støðu hesum viðvíkjandi.

Endmálið er sjálvandi at fáa eina góða diskusjón við limirnar um, hvussu vit kunnu koma víðari í viðgerðarspurninginum. Eisini er tað møguligt at tosa um hvussu vit loysa tann akutta trupuleikan.

Vístur verður ein filmur frá viðgerðarstaðnum Balcova í Turkínum, og kunning um hettar staðið verður eisini á skránni. Balcova er eitt serligt stað fyri giktsjúk fólk, og nýtur norski staturin nógv hetta staðið fyri teirra giktsjúku.

Seinni í komandi árið er ætlanin at taka evnið fram aftur á almennum fundi.

Ætlandi verður hol sett á viðgerðarspurningin mikukvøldið 12 nov kl 19.30, og vónar felagið at nógvir limir nýta høvið at koma á fundin og geva sítt ískoyti til viðgerðarspurning. Fleiri hugsanir koma til nevndina, fleiri arbeiðsamboð hava vit at taka av.


*Gravarhjálp*

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

*Tel 311723 - 211723 · Fax 321722*

Sosialurin 341800



FISH & CHIPS

Tilboð hesa vikuna

2 várrullur v/chips og
1 sodavatn frá Føroya Bjór

kr 45,-

Upplatingartíðir:
mán-týs-mik 12-14 og 17-23
hós-frí 12-14 og 17-24
leyg 17-24
sun 17-23

FISH & CHIPS · tel 317405


## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Jógvan Johannesen**
**Tórshavn**

andaðist og varð jarðaður.

Takk fyri blómur, kransar, heilsanir og hjálpandi hendur í sambandi við jarðarferðina. Takk øll tit mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Maria**











GSM FRÍTÍÐ

| | Teletíð | GSM FRÍTÍÐ |
|---|---|---|
| Stovnan | 300,-* | 0,- |
| Mánaðargjald | 0,- | 40,- |
| Samrøður - dag | 3 kr/min | 2,25 kr/min |
| Samrøður - kvøld | 2 kr/min | 0,75 kr/min |
| SMS-boð | 0,75 | 0,50 |

*íroknað kr. 100,- talutíð

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum*